# Politikkur snýr seg um at gera mun

**Tað finst eitt ótal av allýsingum av, hvat politikkur nú einaferð er. Palme segði, at politikkur var at vilja, onkur annar hevur sagt, at politikkur snýr seg um vælferðina hjá tí einstaka. Men í grundini snýr politikkur seg stutt sagt um at gera mun.**

JÓANNES EIDESGAARD
*Løgmaður*



Drívmegin í tí politiska arbeiðinum er kenslan av og vitanin um, at ein er heilt frammi við eldin í politisku smiðjuni, har jørnini verða smíðaði. Vit eru inni í politiska smiðjuni, har hugskotini verða født, og vit eru við, meðan jarnið verður smíðað og byrjar at taka skap, og vit eru við, tá síðsta hond, verður løgd á verkið.

Vit vita sjálvandi eisini, at lidna vøran skal hava eitt skilagott endamál. Hon skal gagna øllum teimum, sum eru røttu móttakararnir, nevniliga borgararnir. Hetta ger, at politiska arbeiði altíð skal vera meiningsfult og skal gerast við ábyrgd og virðing.

Hava vit so í sitandi samgongu gjørt mun seinastu fýra árini?

Ja, tað hava vit í ríkan mát. Vit hava veruliga flutt samfelagið munandi fram á leið, soleiðis at vit øll hava tað betri í dag, enn vit høvdu tað fyri fýra árum síðani. Hetta er galdandi flest allar føroyingar, ung sum eldri. So vit hava gjørt mun – og tí kunnu vit við reistari pannu bjóða okkum fram til fýra ár afturat.

Vit hava í fýra ár havt trygg politisk viðurskifti, har eisini arbeiðsmarknaðurin hevur ásannað hetta. Tí fyri fyrstu ferð nakrantíð eru sáttmálar gjørdir yvir fleiri ár. Hetta prógvar eina trúgv upp á politiskan stabilitet. Vit hava vent gongdini í samfelagnum frá at hava niðurgongd til nú, at vit hava framgongd. Ja, so stóra, at fleiri vilja vera við, at ferðin á búskapinum er ov stór. Vælferðartænasturnar eru munandi styrktar serliga innan eldraøkið, har fleiri stovnspláss, nú eru, umframt at inntøkurnar hjá pensjonistum eru munandi hækkaðar. Men eisini fyri lesandi ungdóm eru umstøðurnar batnaðar, har m.a. stuðulsskipanin til lesandi er broytt rætta vegin.

Hetta bert fyri at nevna nøkur mál burtur úr rúgvuni. - So vit gjørdu mun, hóast vit ikki náddu øllum. Tí ætla vit okkum als ikki úr arbeiðsklæðunum, men fara við áræði inn aftur í politisku smiðjuna.

## Góðu ungdómar av Toftum

Tað er hugaligt á henda hátt at fáa høvið at stuðla tykkum, sum hava setta tykkum mál at fara eina ferð uttanlands. Av tveimum góðum grundum. Tann fyrra, tí tað er sera hugaligt, at ungdómurin setur sær mál og vil náa teimum, eisini tá talan er um eina uttanlandsferð. Tann seinna, tí at tit seinni í lívinum ivaleyst fara at minnast aftur á eina slíka uttanlandsferð, tá lív tykkara stóð í fagrasta blóma

**Góða uttanlandsferð og alt gott í framtíðini**







# Nøkur av mínum hjartamálum



SÆUNN Ó. HANSEN
*Valevni Sambandsfloksins*

- Heilsuverkið
- Útbúgving
- Umhvørvið

## Heilsuverkið

Sjúkrahúsverk Føroya, tvs. Nærverkið, Røktarheimini og sjúkrahúsini skulu hava neyðugu játtanina til dagliga rakstrin.

Virksemið innan alt Sjúkrahúsverk Føroya er økt munandi seinastu 10 árini.

Starvsfólkatalið eru ikki økt í sama mun og hetta viðførir, at arbeiðsbyrðan nú er ov tung fyri tey starvsfólk, sum virka innan Sjúkrahúsverk Føroya. Alt fleiri og fleiri verða langtíðarsjúkrameldað.

Tí er alneyðugt, at vit miðvíst virka fyri rekruttering av starvsfólkum til Heilsuverkið.

Samstundis er neyðugt at góðskumenna og góðskutryggja tænasturnar.

Heilsuverkið er fyri sjúklingin og tí er neyðugt at fjálgað verður um starvsfólkini soleiðis, at sjúklingurin fær so góða viðgerð, røkt og eftirviðgerð sum yvirhøvur gjørligt.

Samstundis má arbeiðast fyri, at sosiala lóggáva okkara verður soleiðis skipað, at tey sjúku, fólk við serligum tørvi og tey eldru fáa viðgerð og stuðul á sama støði sum í grannalondum okkara.

## Útbúgving

Útbúgvingarskipan okkara skal altíð verða á hædd við tey krøv, sum eitt framkomið samfelag setur.

Útbúgvingarskipanin eigur at verða løgd soleiðis til rættis, at øllum føroyingum stendur í boði at fáa best møguliga útbúgving á so mongum økjum sum til ber og at vinnulív okkara eisini á hendan hátt fær best møguligar umstøður at arbeiða undir.

Útbúgvingarnar skulu altíð verða soleiðis, at tær kunnu verða góðkendar á altjóða stigi.

Tey lesandi eiga at fáa útbúgvingarstuðul, sum tryggjar øllum fíggjarligar møguleikar at fáa ta útbúgving, sum tey sjálvi ynskja.

Allir lærarar og útbúgvingarleiðarar skulu hava møguleika fyri regluligari førleikamenning.

Tað skal verða møguligt at taka fleiri hægri útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum, t.d. løgfrøði.

## Umhvørvið

Eg vil virka fyri einum tilvitaðum og miðvísum umhvørvispolitikki og harvið verða við til at varðveita fríu og vøkru náttúru okkara til komandi ættarlið.

Somuleiðis virka fyri alternativum orkumøguleikum.

## Fíggjarpolitikkur

Ein treyt fyri omanfyrinevndu tænastum er ein skynsamur fíggjarpolitikkur. Ti er neyðugt við einum sterkum og fjølbroyttum vinnulívi, sum gevur bestu møguleikar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum og trygg fíggjarviðurskifti eru fyritreytin fyri vælferðini hjá tí einstaka føroyinginum.

**Les meira á: saunn.com**